## Vikuskiftistiltak á Slættanesi

Aftur í ár skipar Sandavágs Fornminnafelag fyri vikuskiftistiltakið á Slættanesi, tiltakið verður nú um vikuskiftið. Í skúlanum verður myndaframsýning av flólki og bygdalívi á Slættanesi. Leygarkvøldið: Í skýmingini spælir Knút Olsen fíól í skúlanum, stykkir av Ole Bull. Marjun Dalsgarð og Egin Markná hugleiða um barna- og summarminni á Slættanesi. Dansifelagið Tøkum Lætt kemur at dansa á miðnátt leygarkvøldið, seinni um náttina verður Syngið Við-løta, har Tummas Heri Thomassen og Knút Olsen spæla harmoniku. Sunnudagin: Kl. 14:00 verður guðstænasta í skúlanum, har Theodor Olsen prædikar. Í samband við tiltakið ger Vága Ríðingafelag túr úr Miðvági leygardagin kl. 15, og gongutúrur verður av Oyrargjógv kl. 14:00. M/b Ólavur siglir fríggjakvøldið kl. 20 av Oyrargjógv. Leygardagin siglir Ólavur fleiri túrar av Oyrargjógv, fysti túrurin verður kl. 14 og hann heldur á til kl. 20 - Kl. 23 siglir Ólavur av Slættanesi á Oyrargjógv. Sunnudagin siglir Ólavur av Oyrargjógv kl. 13 og heimaftur aftan á guðstænastuna



# Nýggjur skúli til eldru næmingarnar

**Nýggi skúlin í Runavík hýsir nú næmingum í 4. – 10. flokki. Prísurin fyri skúlan er slakar 100 milliónur krónur**

NÝGGJUR SKÚLI
*Tíðindaskriv*



Býráðið í Runavíkar kommunu avgjørdi í 2004, at umskipa skúlarnar í Rituvík, Runavík, Glyvrum og Søldarfirði. Avgjørt varð at fara frá fýra skúlaeindum til tvær, og í hesum sambandi byggja nýggjan dagførdan skúla í Runavík.

Avgjørt varð at skúlin í Runavík, sum var bygdur miðskeiðis í sjeytiárunum, skuldi takast niður heldur enn at byggja uppí. Verandi býráð avgjørdi eisini at samskipað verkætlanina viðvíkjandi bygging av mentanarhúsi og nýggjum skúla, soleiðis at høli til mentunarlig tiltøk verða bygd saman við nýggja skúlanum. Articon fekk í kapping millum tríggjar byggifyritøkur uppgávuna. Sáttmáli varð undirskrivaður 30. aug. 2006 og 2. okt. 2006 varð spakin settur í.

Tíðarætlanin í sáttmálanum er soleiðis, at bygningurin verður handaður byggiharranum í trimum stigum. Teir fyrstu 1600 m² vóru tiknir í brúk av skúlanum við ársbyrjan 2008. Restin av skúlastovunum verður tikin í nýtslu nú skúlaárið byrjar í komandi viku.

Sostatt verður nýggi skúlin nú karmur um skúlagongdina hjá øllum næmingum frá 4. – 10. flokk hjá Runavíkar Kommunuskúla, meðan 1. – 3. flokk umframt næmingar við serligum tørvi, koma at halda til í skúlanum á Glyvrum. Skúlin í Rituvík verður nú nýttur til elsta flokkin í barnagarðinum. Søldfjarða skúli er langtíðarleiðaður til Handilsskúlan, og har byrja sum skilst fýra FHS flokkar nú eftir summarferiuna.

### Síðsta byggistigið

Tað síðsta byggistigið í nýggja skúnanum umfatar námsfrøðiligatænastudepilin, bókasavn, samkomuhøli, matarstovu og tónleikahøli saman við hølum til húsavørðin, skúlasjúkrasystir og høli til NSR-ráðgeva. Hetta verður eftir ætlanini liðugt við ársskiftið, og merkir hetta at tá er allur bygningurin liðugur.

Sáttmálin millum Runavíkar Kommunu og ArtiCon er ein "partalagsavtala" og er arbeiðið skipað sum heildar-arbeiðstøka.

Heildarætlanin umfatar skúlabygning, ið er uml. 5000 m² til víddar. Lendið, ið útlagt er til skúlaøkið, er umleið 16000 m², harav 5000 m² eru gjørdir til spælipláss, grasfløtur og øki til gangandi- og koyrandi ferðslu.

### Í bygninginum eru m.a.:

**Skúli** við nútímans tøkni

**Lyklaskipanin** í skúlanum er ein nútímans elektronisk skipan. Skúlin er - í staðin fyri ta "traditionellu" talvuna – útgjørdur við interaktivum talvum, ið eru í skúlastovum og serhølunum. Í skipanini eru nógv ymisk forrit, ið eru til frálæru, eins og at samband er til alnótina í øllum stovum og hølum.

**Samskifti** útfrá- og innanhýsis við lærara, er um tráðleysa IP-telefon skipan. Hetta er fyrstu ferð at hetta verður roynt í føroyskum skúla.

**Samlaði kostnaðurin** nú skúlin verður liðugur verður uml. 94 mill. kr. Íroknað hesa upphædd er víðkan av upprunaligu samkomuhøllini umframt innbúgv, KT o.l. Sjálv byggiætlanin hevur bæði í kostnaði og byggitíð gingið væl í mun til upprunaliga sáttmálan.

### FAKTA
**um nýggja skúlan**

- 18 flokshøli
- 8 serstovur
- 4 bólkarúm
- 3 balkongir
- námsfrøðiligur tænastudepil
- bókasavn
- samkomuhøll til 340 fólk
- fyrilestrastova
- matstova
- tónleikastova
- umsitingarhøli
- goymslur, wc o.l.

# Bjørt roynir at broyta russiska innflutningsbannið

**Vinnumálaráðið er nú farið til verka at broyta russiska innflutningsbannið móti føroyskum laksaúrdráttum. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvið við Heilsufrøðilugu Starvsstovuna**

ÚTFLUTNINGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Russiska innflutningsbannið fevnir um laks og laksaúrdráttir frá teimum virkjum, sum høvdu vitjan av russisku eftirlitsmyndugleikunum í mai í ár.

- Málið er sera álvarsamt, tí tað snýr seg um stór útflutningsvirði, ið kunnu fara fyri skeytið. Vinnumálaráðið nýtir tískil alla neyðuga orku at loysa málið so skjótt og skynsamt sum til ber, sigur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum.

Heilsufrøðiligastarvsstovan arbeiðir – saman við umrøddu alivirkjum – at rætta tey frávik, sum russiska matvørueftirlitið hevur víst á. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eisini boðað russiska matvørueftirlitinum frá, at matvørueftirlitið verður boðið til Føroya á nýggja eftirlitsvitjan at kanna, um ávístu frávikini eru rættað samsvarandi russisku krøvunum.

Samband hevur verið við matvørumyndugleikarnar í Noreg og Danmark, sum hava havt líknandi trupulleikar við matvøruútflutningi sínum til Russlands.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan fer at bjóða stjóranum fyri russiska matvørueftirlitinum til Føroya á fund at viðgera tey frávik, sum ósemja er um, eitt nú russiska kravið um, at hvørt einstakt alivirki skal hava egna kanningarstovu.

Harumframt er ætlanin at tosa um møguligt samstarv landanna millum, bæði ímillum myndugleikar og ímillum vinnuvirki.

